Fróðskaparsetur Føroya

16. januar 2008

**Fundarinnkalling til setursráðsfund nr. 1/2008**

| | |
|---|---|
| Dagur og klokkutíð: | Hósdagin 17. januar 2008, kl. 13-16 |
| Fundarstaður: | Setursskrivstovan |
| Á fundi: | Jóan Pauli Joensen, rektari<br>Hans Pauli Joensen, vararektari og megindeildarráðsf. fyri NVD<br>Elin Súsanna Jacobsen, megindeildarráðsf. fyri SSD<br>Malan Marnersdóttir, megindeildarráðsf. fyri FMD<br>Rúna Hjelm, setursskrivari |

## Dagsskrá:

1. **Gjøgnumgongd og góðkenning av 9/2007 setursráðsfundi 13. desember 2007.**
   Góðkend

2. **Góðkenning av dagsskrá.**
   Góðkend við ískoyti (nýtt mál: Mál 11)

**Mál at taka støðu til / umrøða:**

3. **Fíggjarlógarjáttanin 2007.** (J.nr. (3) 10-12-20070002).
   Fíggjartølini fyri 2007, ið vórðu stemmað av per 16.01.2008, vórðu løgd fram á fundinum. Sambært hesum tølum verður javnvágur í rokniskapinum fyri 2007. Varð tikið til eftirtektar.

4. **Varandi loysn við undirvísing.** (J.nr. (3) 10-40-20070013).
   Nógv tjak var um hetta mál, og avgjørt varð at setursskrivstovan saman við deildunum skuldi arbeiða víðari við málinum.

5. **Endurskoðan av samsýningum til leysalærarar og próvdómarar.** (J.nr. (3) 10-10-20070003).
   Skotið verður upp, at samsýningar til leysalærarar og próvdómarar verða endurskoðaðar, so tað fæst greiði á, hvussu nógv skal latast fyri at leggja skeið til rættis, hvussu tímalønin er fyri venjingar, fyrilestrar, gjøgnumgongd av venjingaruppgávum, fyrireiking til próvtøku og meting av próvtøkuuppgávum. Eisini skal greiði fáast á, hvat próvdómari skal verða løntur fyri. Hevur hann ella hon rætt til løn fyri at lesa pensum áðrenn próvtøkuna o.a. Eisini skal gerast uppskot til nýggjan leysalærarasáttmála.


| Poststaður | Bústaður | Heimasíða | T-postur | Telefon | Faks |
|---|---|---|---|---|---|
| Postrúm 272<br>FO 110 Tórshavn | J. C. Svabos gøta 14<br>FO 100 Tórshavn | www.setur.fo | setur@setur.fo | 35 25 00 | 35 25 01 |

Mælt verður til, at tað verður sett ein nevnd at viðgera hetta og koma við uppskoti. Nevndin verður mannað soleiðis:

1 umboð fyri ávikavist:

- Megindeildarformennirnar ella lærarar í føstum starvi
- Leysalærarar á setrinum
- Deildarskrivararnar
- Setursskrivstovuna

Málið var samtykt.

6. **Arbeiðsbýti millum megindeildarráðsformenn og deildarskrivarar.** (J.nr. (3) 10-05-20070010).

Setursráðið tekur undir við, at rektarin, saman við setursskrivstovuni, arbeiðir víðari við málinum, í samskifti við Starvsmannafelagið og Lønardeildina í Fíggjarmálaráðnum.

7. **Varðveitsla av uppgávum og próvtøkusvørum. Uppskot til reglur.** (J.nr. (3) 10-46-20070018).

Samtykt varð at málið verður útsett til næsta setursráðsfund.

8. **Reglur fyri samskifti á Fróðskaparsetrinum millum lærarar/starvsfólk og studentar.** (J.nr. (3) 10-00-20070005).

Samtykt varð at málið verður útsett til næsta setursráðsfund.

9. **Uppskot um felags keyp av orðabókum frá Sprotanum.** (J.nr. (3) 10-37.01-20070001).
Samtykt varð at royna eitt intranethald frá Sprotanum fyri alt Fróðskaparsetrið í eitt ár.

10. **Uppskot um skeið fyri Speki-fyrilestrahaldarum.**
Uppskotið fall, men víst varð á, at tørvur var á eini stuttari upplæring í, hvussu ein skal bera seg at í sambandi við sjónvarpsupptøku.

11. **Uppskot um Setursátøk.** (J.nr. (3) 10-05-20070011).

Hans Pauli Joensen legði fram uppskot um at gera eitt serligt setursátak rættað mótvegis Føroya Landstýri og Føroya Løgting (serliga fíggjarnevndini) eftir valið. Undan valinum hevur nógv kjak verið um at menna "eitt altjóða universitet í Føroyum" (fyri at nýta orðini hjá politikarum og øðrum, sum hava úttalað seg). Hann heldur tí tað er umráðandi fyri Fróðskaparsetrið, at vit taka politikkarnar uppá orðið og skipa fyri einum tiltaki, har vit vísa á, hvat Fróðskaparsetrið hevur at bjóða í sambandi við gransking og undirvísing, og hvørjar framtíðarmøguleikar og ætlanir Fróðskaparsetrið kann vísa á.

Undir kjakinum kom fram, at setursráðið tekur undir við hesum máli. Rektarin bjóðar Landstýrinum við mentamálaráharranum á odda og Løgtinginum til ein kunningarfund á Fróðskaparsetrinum. Í sambandi við átakið skulu deildirnar gera útrokninger fyri, hvat útbúgvingartilboðið í dag kostar, og eisini hvat kostnaðurin verður framyvir, um núverandi skeið skulu bjóðast úr oftari, ella onnur skeið koma afturat.

Eitt annað tiltak, ið setursráðið eisini tók undir við, var at kunningarráðgevin, Eir í Ólavstovu, skipar fyri einum serligum temadagi fyri alt Fróðskaparsetrið. Endamálið við hesum temadegi er ein liður í arbeiðinum at royna at samansjóða fólkið á setrinum meira.

**12. Kunning frá deildunum o.ø.:**

a. **Fundur á Náttúruvísindadeildini 10.12.07.** (J.nr. (3) 10-01-20070004).
Onki at leggja afturat.

b. **Fundur á Søgu- og Samfelagsdeildini 14.1.08.** (J.nr. (3) 10-01-20070003).
Onki at leggja afturat.

**Avgreiðslumál:**

13. **Próvdómaragóðkenningar. Eftir áheitan frá ávikavist Søgu- og Samfelagsdeildini og frá Náttúruvísindadeildini hevur Mentamálaráðið góðkent hesar próvdómarar:**

a. **Bárð Larsen, cand.jur., løgfrøðiligan ráðgeva hjá Kommunusamskipan Føroya *Grundskeið í lóg* og Lenu Nolsøe, cand.phil., savnsvørð á Landsskjalasavninum *Søga***
Staðfest.

b. **Turid Madsen, cand.scient., jarðfrøðing á Jarðfeingi *Innan jarðfrøði.***
**At staðfesta.** (J.nr. (3) 10-25-20070001).
Staðfest.

**Kunningarmál:**

**14. Eir í Ólavsstovu er komin í starv á Fróðskaparsetrinum sum samskiftis- og kunningarfólk, hon byrjaði 2. januar.** (J.nr. (3) 10-22.01-20070015).
Tikið til eftirtektar.

**15. Fróðskaparsetrið er við í samstarvi um *Nordic master's programme (NMP) in marine ecosystems and climate* saman við Universitetet i Bergen, Aarhus Universitet og Háskóla Íslands. Í januar hava Rúna Hjelm, Winny í Pætursastovu, Knud Simonsen, Bogi Hansen og Hjálmar Hátún verið í Noregi á fundi um samstarvið.** (J.nr. (3) 10-48-20070001).
Á fundinum arbeiddu Rúna og Winny saman við umboðum frá fyrisitingunum hjá teim luttakandi universitetunum. Høvuðsuppgávan hjá okkum var at fáa tann fyrisitingarliga partin av NMP samstarvinum uppá pláss. Vit merktu ein sera stóran vilja til at fáa hetta samstarvið í lag. Á fundinum komu vit millum annað ásamt um, at høvuðsumsitingin av NMP skuldi leggjast til Bergen Universitet. Harvið verður tað væntandi minni fyrisitingarligt arbeiði við at leggja vil rættis NMP. Tey lesandi skulu hava møguleika at taka skeið á teim ymisku Universitetunum, sum síðani verða góðkend av einum "programme board", ið er hægsti fakligi myndugleiki. Stórur dentur verður lagdur á, at NMP skal vera ein tvørfaklig útbúgving innan havfrøði og klima. Tað er eisini eitt krav, at tey lesandi skulu luttaka á skeiðum bæði í Århus, Bergen, Íslandi og Føroyum fyri at fáa góðkent útbúgvingina.

**16. Altjóða Skrivstovan heldur kunningarfund um nýggju Nordplus rammuskránna 2008-2011, fundurin verður í høllini á Føroya Læraraskúla 24.1.08 kl. 13-16.**

***17.*** ***Northern Periphery Programme 2007-2013*** **verður lagt fram á fundi í Aviemore, Skotlandi tann 20-21.2.08.**

***18.*** **Skeið 15.-17.5.08 í Milano, Italia** ***How to run your summer course successfully*****, European Association for International Education skipar fyri.** (J.nr. (3) 10-68-20070012).

**19.** **Høvuðsritgerð** ***Feeding ecology of larval cod (Gadus morhua L.) on the Faroe Shelf, 1998-2005,*** **Kristoffer Klitgård Nielsen, Biologisk Institut, Marin Økologi, Aarhus Universitet, september 2007. Kristoffer fekk námsferðarstuðul í 2005.** (J.nr. 0071-01392).